ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.



# Sethús á Eiði

Um hóskandi boð fæst, verður setahúsaogn við hjalli við hesum lýst til sølu.

Talan er um grundøki uml. 357 m² við ástandandi sethúsum og hjalli.

Húsini eru upprunaliga bygd uml. 1916. Grundvíddin er 47 m². Kjallarin óinnrættaður.

**Miðhædd:** Køkur, tvær stovur, gangur og wc.

**Loft:** Trý kømur.

Húsini eru nakað dagførd, men treingja til ávísar ábøtur. Húsini standa mitt í bygdini, og útsýnið er sera gott.

Sethúsaognin er partur av matr. nr. 164 a, Eiði. Ognin er undir sundurbýti í løtuni, og jørðin, sum í dag er partur av samlaðu ognini, fylgir sostatt ikki við í søluni.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fríðu Patursson, advokat, frp@jura.fo ella skrivaran Anniku Reginsdóttir Olsen, aro@jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

# ÁRSAÐALFUNDUR hjá P/F Smyril Line

Boðað verður við hesum til ársaðalfund í P/F Smyril Line (reg. nr. 544) **týsdagin 13. apríl 2010 kl. 10:00** at verða á Hotel Føroyum, við Oyggjavegin 45, 100 Tórshavn, við hesi dagsskrá:

1. Val av fundarstjóra.
2. Frásøgn frá virki felagsins í farna ári.
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar.
4. Uppskot frá nevndini um, hvussu ársavlopið skal verða nýtt ella um rindan av halli sambært góðkenda roknskapin.
5. Val av nevndarlimum.
6. Val av grannskoðara.
7. Uppskot frá nevnd ella parteigarum um nakað er.

Roknskapur til aðalfundin liggur frammi á skrivstovu felagsins 8 dagar undan aðalfundinum.

Til at greiða atkvøðu á aðalfundinum krevst, at parteigarin í seinasta lagi mánadagin 12. apríl 2010 hevur prógvað sín atkvøðurætt á skrivstovu felagsins J. Broncksgøta 37, 100 Tórshavn.

**P/F Smyril Line**
**NEVNDIN**

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.



# TIL SØLU

Vegna Sp/f Hentor í konkurs, skrás. nr. 3794, verður niðanfyri nevndi bilur við hesum lýstur alment til sølu fyri hægstbjóðandi:

• VW Syncro, árg. 1998, skrás. nr. NM 151

Nærri fæst at vita við at venda sær til Óla Jákup Kristoffersen, advokat, ojk@jura.fo ella skrivaran Elina Svínoy, els@jura.fo. Somuleiðis síggjast myndir inni á heimasíðuni www.jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

# Kettlingur
(frensur) **horvin**



úr Fútalág fríggjakvøldið 19. mars. Uml. 20 vikur gamal, strípputur, hvítar labbar og bringu. Hevur nakar sæð hann ella tikið hann upp, vinarliga ringið 315525 /515525 / 251540

Eysturkommuna

## Starv á Frítíðarheiminum í Leirvík

Søkt verður eftir 1 námsfrøðingi í tíðaravmarkað starv frá 10. mai 2010 til 10. august 2011, fyri námsfrøðing í barnsburðarfarloyvi. Talan er um starv á 30 tímar um vikuna.

Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett ístaðin.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta, í hendi í seinasta lagi **15. apríl 2010 kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hallbjørg Eliasen, stovnsleiðara á telefon 73 00 44.



# Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 288233)**

# Aðalfundur

Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag hevur aðalfund 9.apríl 2010 í Virkinum á Sandi kl.19.30, aftaná fundin vera løgtings- og landstýrisfólk flokksins at greiða frá tí polittisku støðuni.

**Møtið fjølment**!

Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag

Sosialurin -har tað hendir